B68 best á Skálafjør›inum

Bæ›i toftamenn og gestirnir úr Runavík misn‡ttu nógvar møguleikar á Svangaskar›i

Dánjal Hansen í hornatøkum vi› Øssur Jacobsen

Súni Frí›i Johannesen er uppvaksin í Runavík – út móti markinum til Nes kommunu. Sí›ani 1992 hevur hann spælt nógv í 1. deild hjá B68. Hann hevur skora› nógv mál, og ta› hevur ikki minst gingi› út yvir NSÍ. Sunnudagin var hann aftur upp á spæl. Hann skora›i tvey mál, og harvi› hevur hann sí›ani 1992 skora› sjey fer›ir móti barndómsfelagnum.

B68 hev›i fleiri upplagdar møguleikar, og Súni Frí›i Johannesen var endastatión-in bá›u fer›irnar, tá teir skor-a›u. Í bá›um førum var hann leysur vi› Rúna Joensen, sum hesa fer› var afturvaldur at velja máli› hjá NSÍ.

Fyrra máli› kom, tá hálvur tími var farin. Marlon Jorge skifti frágera væl úr høgru og í hitt bor›i, og tá bólturin kom innfyri aftur máli›, eydna›ist ta› Súna Frí›a Johannesen at prika bóltin framvi› málverjanum.

Seinna máli› kom, tá tí›in var um at vera farin. NSÍ hev›i flutt fólki› langt fram á vøllin, og ta› var tunnt í verjupartinum, tá ein langur bóltur var› stungin fram til fremsta mannin hjá toftamonnum. Úr eitt sindur í vinstru setti hann fer› á, megna›i at koma framum aftasta verjumannin hjá NSÍ, og var aftur tryggur, tá Rúni Joensen kom út ímóti.

Marcello Marcellino var raskur í álopinum. Hann arbeiddi eisini aftarlaga á vøllinum, og tvær fer›ir í 2. hálvleiki var um reppi›, at hann einsamallur syrgdi fyri málum. Í bá›um førum fekk hann bóltin á mi›jum vølli, sneiddi fleiri mótstø›umenn av sær, kom í brotsteigin og sendi dygst omanfyri máli›.

Drúgvir

Toftamenn fegna›ust sjálvsagt um sigurin, sum ta› hev›i veri› strevi› at fingi › til høldar.

Sí›sta korteri› stó› nógv á, og ta løtuna vóru hol í verjuni, eisini tí at mi›vøllurin, har fyrrverandi NSÍ ma›urin Ey›stein Skipanes hev›i veri› eitt satt arbei›sjarn, datt ov langt aftur.

Men sum heild kom ta› til sjóndar, at ta› var størri tyngd í heimali›num, enn ta› var í gestunum. Øssur Hansen og Jákup Eli Olsen samanspældu væl í vinstru, har verjuparturin hjá NSÍ var tunnur, í mi›verjuni vóru Arnbjørn Danielsen, Jan C. Dam og Jákup Djurhuus sera drúgvir, afturíaftur komni Jan Petersen hevur syrgt fyri, at ta› er tættari í høgra verjubor›i, og Magnus Poulsen vardi væl í málinum.

Tunnan álopspart

Sum seinna umfari› lei› gekk ta› mesta fyri seg frammanfyri sunnara máli›, har Magnus Poulsen stó› millum stólparnar. Men ta› eydna›ist ongantí› gestunum at fáa bóltin í meskarnar.

Næst vi› var Sjúr›ur Jacobsen, sum í 2. hálvleiki var› settur fram á mi›vøllin. Fyrst sendi hann eftir gott uppspæl í høgru og innlegg omanfyri máli›, og fram móti endanum sendi hann tveir metrar uttanfyri brotsteigarsamankomingina í vinstru ni›ur á handaru stólpasamankomingina.

NSÍ lei› undir, at álopsparturin var ov tunnur. Christian Høgni Jacobsen var skaddur, og longu í 1. hálvleiki noyddist Mortan Hansen av vøllinum vi› knæska›a. NSÍ hev›i í 2. hálvleiki fleiri hornaspørk, sum fingu loyvi at sigla framvi› málinum, og tá ta› fram móti endanum onkra fer›ina var órudduligt frammanfyri B68 máli›, var eingin NSÍ málrevur á plettinum.

Tyngdin í NSÍ spælinum er ikki nóg sannførandi. Ta › er t‡uligt, at ta› er ein bági, at royndu menninir, Arnfinn Langgaard og Djóni N. Joensen, eru skaddir. Á mi›vøllinum hevur li›i› kanska ein tann evnabesta mi›vallaran, men ta› gongst ikki væl at fáa Ian Højgaard í tann leiklutin, sum fótbóltsevnini áttu at havt vi› sær.

Birgir Sondum hev›i floytuna um hendi. Grannauppger›in var á ongan hátt ófantalig. Ta› átti ikki minst dómarin sín part í. Hann hev›i stóran myndugleika, var á sta›num, har ta› gekk fyri seg, og ta› var ongantí› ney›ugt hjá honum at brúka kortini.

jh

B68:
Magnus Poulsen – Jan C. Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Djurhuus – Jan Petersen, Marlon Jorge, Ey›stein Skipanes, Øssur Hansen, Jákup Eli Olsen – Marcello Marcellino, Súni Frí›i Johannesen

NSÍ:
Rúni Joensen – Brynjolvur Nielsen, Kári Hansen, Sjúr›ur Jacobsen, Jónstein Petersen – Gert Langgaard, Dánial Hansen, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen – Sonni L. Petersen, Mortan Hansen

Sumba lyfti seg meira

Vi› sigrinum á B71, sum samstundis var annars sigurin á ra›, hevur Sumba nú vunni› seg enn longur frá ni›urflytingarsessinum

JÁKUP MØRK

Sandoyingar, sum naka› skerdir fóru su›ur um fjør›in at gera seinna su›uroyartúrin burturav sær, høvdu ivaleyst vóna›, at sumbingar kundu lata teir fara heim aftur vi› trimum stigum í vi›førisposanum.

Sumbingar vóru tó alt anna› enn samdir í hesum. Beinanvegin royndu teir at trysta spæli› oman á sandoyarhálvuna, og ta› gekk heldur ikki long tí›, a›renn hetta gav úrslit.

Í vinstru verjubor›i hjá sandoyingum slapp sumbiarleikari at bróta seg ígjøgnum, og eftir at Waldemar fyrst hev›i vart fyri í tveimum atløgum, eydna›ist tad at enda Sasa Tomajek at senda bóltin í neti›.

Tveir sigrar á ra›

Sum skilst á lagnum, so royndu sandoyingar eftir hetta at fáa javnvág í aftur dystin, men hetta eydna›ist teimum onganti›.

Sumbingar løgdu hinvegin dentin á verjupartin, solei›is at sigurin kundi tryggjast. Vid strí›sviljanum sum fremsta vápn, megna›u teir eisini at halda fast í verjupartinum, hóast sandoyingarnir eisini høvdu sínar møguleikar.

Vi› sigrinum vunnu sumbingar sær enn tr‡ stig í ni›urflytingarstrí›num, og sammett vi› undanfarnu árini, skuldu tí veri› gó› líkindi at bjarga› tilveruni í deildini einafer› enn.

Tey bæ›i undanfarnu árini hevur ta› nevnliga bert eydnast sumbingum at vunni› tveir dystir, sum so afturímóti hava tryggja› teimum dyst um upp- og ni›urflyting. Nú hevur sy›sta li›i› sostatt vunni› tveir dystir á ra›, men einsamallar ver›a hesir sigrar neyvan nóg miki› í ni›urflytingarstrí›num, tí mangt er, sum bendir á, at ni›urflytarin í ár kemur at hava fleiri stig, enn talan hevur veri› um tey bæ›i seinnu árini.

Gongdin skal vendast

Sandoyingar, sum annars fingu eina rímuliga gó›a byrjan, eru nú brádliga at finna nidanfyri sumbingarnar á stigatalvuni, og teir dylja ikki fyri, at hetta ikki er ein stø›a, sum teir meta vera nøktandi.

Á›ur er bo›a› frá, at teir mi›ja móti einum plássi mi›skei›is í rø›ini, og teir meta eisini framhaldandi, at hetta mál kann røkkast.

Til tess krevst tó, at tepru tapini, og javnleikirnir, har stigini verda mist í evstu løtu skulu leggjast á hyllina. Nú tri›ingurin av kappingini er runnin, er hetta longu hent teimum fleiri fer›ir í ár, og eisini í fjør var hetta eitt fyribrigdi, sum ofta kundi síggjast á Sandi.

Megna teir at venda hesi gongdini, er einki, sum for›ar fyri, at B71 ver›ur at finna naka› ovarlagari í rø›ini, men hinvegin skal gongdin eisini vendast skjótt, um tad ikki aftur í ár skal gerast talan um strí› móti nidurflytingarspøkilsinum.

Sumba-B71 1-0 (1-0)

1-0: Sasa Tomajek 4
Dómari:
Oddmar Andreasen (HB)
GK: Eirikur Joensen 23, Jan Poulsen 90

Sumba:
Eigil Olsen
Marlon Kjærbo
Spasojé Biberdzic
Eirikur Joensen
(Jón Lisberg, 90)
Nikola Biberdzic
Bergur Vinther
René Thomsen
(Jan Poulsen, 89)
Mortan úr Hørg
Sasa Tomajek
(Thomas Johan Nónfjall, 90)
Hans Jacob Thomsen
Hallur Dam Joensen

B71
Waldemar Nowicki
Jógvan Jón Petersen
Bergleif Sólsker
Kári Nielsen
Høgni Hansen
Julian Florescu
Rúni Mohr
(Antines Magnussen, 67)
Bernhard Petersen
(Símun Hansen, 75)
Alex Nielsen
Jón Brekku
Hans Jørgen Djurhuus
Venjari: Per Langvad
GK: Hans Jørgen Djurhuus 1, Jógvan Jón Petersen 57, Rúni Mohr 60
RK: Jógvan Jón Petersen 80 (beinlei›is reytt)

Sumba vann sunnudagin á heimavølli ímóti B71

Vánaligt Í Vágum

Skuldi landskappingardysturin millum FS Vágar og VB ligi› til grund fyri luttøku í fyrstu deild, áttu bæ›i li›ini at flutt ni›ur beinanvegin

EDVARD JOENSEN

FS Vágar hev›i ikki evni at avgera ein dyst, teir áttu at vunni›. Og vágbingar brúktu alt ov nógva tí› til kjaftaslit heldur enn at spæla fótbólt. Stutt og greitt var dysturin í Sørvági vánaligur.

Einasti glottin í øllum dystinum var fyrra máli›, FS Vágar fekk. Men ta› var eisini ein perla. Púra eftir lærubókini.

Vágamenn fingu bóltin langt afturi á egnari hálvu. Sjúr›ur Ellefsen leg›i ein frálíkan, langan bólt fram í høgra bor›, har Tór Ingar Akselsen, sum var farin vi› fullari fer›, ba› um at fáa hann. VB verjan datt sundur, og Tór Ingar leg›i bóltin inn í brotsteigin, har Birgir Joensen beindi hann í mál.

Vágamenn sóu annars út til at ætla sær at vinna, tá dysturin byrja›i. Teir tr‡stu, og ta› gav, sum vanligt er, møguleikar hinumegin eisini. Vágbingar høvdu einstøk mótálop, og átta minuttir vóru farnir av dystinum, sá FS verjan út til at vera sovna› ella í øllum førum halda væl standa til. Ta › sekta›i Cilovic teir fyri og leg›i VB á odda 1-0.

FS Vágar hev›i onkra gó›a roynd, men fekk einki burtur úr. Ta› tóktist, sum teir mistu móti eina løtu. Men í 19 minutti javna›u teir, og tóktust líkasum koma eitt sindur fyri seg aftur. Nú tosa vit um strí›sanda, tí fótbóltsspæli› var einki at reypa av.

Frægasti møguleikin, ta› sum eftir var av fyrru hálvu, var eitt gott langskot frá Birgiri Joensen, sum Bjarni Johansen í VB málinum bjarga›i vi› nevunum.

Runni› var oman og ni›an, uttan at naka› stórvegis fótbóltsspæl kom burturúr. FS Vágar hev›i onkrar møguleikar, men ta›, sum ey›kendi dystin var, at teir dugdu ikki at fáa naka› burturúr. Ov seinir ella ov óneyvir. Verjan var heldur ikki nóg gó› í byrjanini, men kom tó naka› fyri seg, sum út lei›. Me›an vágbingar alla tí›ina tóktust hava nokk vi› ein javnleik.

Var ringt í Sauls tí›, gjørdist hva›na verri í Dávids tí›. Seinna hálva dróg bara ni›ur. Spiltir møguleikar. Menn liggjandi á vøllinum. Bríksl og kjaftaslit. Alt samalt slíkt, sum oy›ileg›i dystin.

Og so ta› sum tykist vera vørumerki vágamanna. Teir kenna ikki sína vitjunartí› og duga ikki at avgera ein dyst. Tvær fer›ir vóru teir tó beinlei›is óhepnir vi› skotum á stongina og yvirliggjaran. Men alt ov nógvir brendir møguleikar.

VB tóktist framvegis at halda seg aftur og vera nøgt vi› javnleik. Tú sakna›i veruliga ta› heilhuga›a fótbóltsspæli›.

Tá 73 minuttir vóru leiktir, kom FS Vágar á odda. Eftir álop fram í høgra bor›, var› bólturin lagdur inn í brotsteigin hjá VB. Tveir vágamenn stó›u í vegin hvør fyri ø›rum og tva›au. Hvørgin tóktist rættiliga vita, hvat teir skuldu gera. Ta› enda›i tó vi›, at Tór Ingar Akselsen fekk lagt bóltin inn fyri máli›, har Birgir Joensen so bara skuldi beina hann í máli›, me›an vágbingar bara hugdu at.

Nú sá út til, at vágamenn ætla›u sær at vinna dystin. Lagi› var gott á ásko›arunum, sum nú hóma›u ein sigur.

Men tá fimm minuttir vóru eftir av vanligu leiktí›ini, brast hesin dreymurin. VB fekk hornaspark, sum Kulic leg›i høgt inn fyri máli›. Loti› fór vi› bóltinum, og Remi í FS málinum kiksa›i fullkomuliga og má taka á sín kropp, at VB javna›i til 2-2, sum eisini gjørdist úrsliti›.

Rættvíst ella ikki fer altí› at ver›a kjakast um. Eingin ivi er um, at FS Vágar átti vandamiklaru møguleikarnar, men teir vóru ikki menn fyri at gagnn‡ta teir. Og so vinnur tú ikki ein fótbóltsdyst.

Nakar vakur fótbóltsdystur var ta› avgjørt ikki. Ikki tí, at spæli› var serliga hart. Heldur klossut og dovi›. F‡ra gul kort vóru givin. Tvey í part.

FS Vágar - VB 2-2

0-1 Robert Cilovic
08. min.
1-1 Birgir Joensen
19. min.
2-1 Birgir Joensen
73. min.
2-2 Milan Kulic 85. min.

Li›ini:

FS Vágar:
Remigius Micosionis, He›in Joensen, Zilvanis Zudys, Sjúr›ur Ellefsen, Albert Ari Thomassen, Tór Ingar Akselsen, Rimvydas Bakus, Hannus Olsen, Birgir Joensen, John Johansen (78-Kim Poulsen) Sonni Johansen (72-Jónsvein Olsen).

Gul kort:
32. min.:
Albert Ari Thomassen
76. min.: John Johansen

VB:
Bjarni Johansen, Ey›un Jacobsen, Magni Jacobsen, Pedrag Ziskovic, Janus Kjærbo, Palli Augustinussen, Tór›ur Holm, Milan Kulic, Jón Pauli Olsen, Kristof Popzynski, Robert Cilovic.

Gul kort:
65. min.: Janus Kjærbo
78. min.: Robert Cilovic

Dómari:
Petur Hansen, LÍF
Linjuverjar úr LÍF

Eins og í Italia

Sum einasti mi›il í ríkinum var Sosialurin vi› í fer›alagnum, tá Herfølge eftir dystin móti FCK fór á sigursfer›

JÁKUP MØRK/
ÁLVUR HARALDSEN
ÚR HERFØLGE

Um ta› var orsaka› av, at talan var um ein føroyskan mi›il, skulu vit lata vera ósagt, men undir øllum umstø›um var eingin trupulleiki hjá okkum at fáa pláss í leikarabussinum, sum skuldi føra leikararnar til Køge, har borgarstjórin førdi fram takkarrø›u.

Aloftast er ta› á sjónvarpsmyndum úr útlandinum, at slíkar stø›ur kunnu síggjast, men á veg gjøgnum Herfølge, stó›u fólk í hópatali kring bussin, har tey buka›u á vindeyguni, og annars royndu allar snildur, til tess at koma í samband vi› hetjurnar, sum høvdu fört gulli› til b‡in.

Komin til Køge, var roki› ikki minni, tí har stó› risastór mannfjøld at fagna li›num.

Manngar›ur var› tó gjørdir, so leikararnir í fri›i kundu sleppa inn á rá›húsi›, ha›ani teir geyla›u gle›i sína út gjøgnum vindeyguni, me›an rúgvan av ásko›arunum sang sínar sigurssangir uttanfyri.

Sjampagnan var› longu sett á bor›i›,tá borgarstjórin helt sí›ani stutta rø›u, har hann fyrst og fremst leg›i dent á, at Herfølge, hóast lítlu støddina, hev›i megna› at arga tey stóru, og fram um alt vinna á teimum.

Eftir at rø›an var hildin, fingu leikararnir ein lítlan gávulut í part, á›renn seinastu myndatøkurnar skuldu fáast frá hondini.

Skráin var, sum vera man, sera tøtt, og ikki var tí› til at n‡ta ov nógva tí› á einstøku stø›unum. Tá fari› var› avsta› aftur, var fer›alagi › kortini einar 10 minuttir seinka›, men hóast danir vanliga eru tiltiknir fyri at ansa sera væl eftir, at allar tí›arætlanir halda, so hoyrdist brádliga í bussinum: Ja, ja, vi kører bara på færøsk tid.

Sostatt tóktust seinkanir vi› meira als ikki at nerva teir hjá Herfølge henda regntunga mei-dagin.

Nei, teir høvdu úr at gera vi› at hátí›arhalda seg sjálvar, og hví skuldu teir ikki eisini ta›. Ta› er hóast alt ikki hvønn dag, at tú fært at vita, at tá ta› ræ›ur um fótbólt, so er restin av ríkinum í minsta lagi eitt fet aftanfyri.

Her heilsar Jákup Mikkelsen upp á Borgmeistaran í Herfølge